Festival del Sole 1. til 8. juli 2023

Komandi summar fer Fimleikafelagið Støkk til Italia á fimleikastevnuna Festival del Sole, sum er í býnum Riccione. Festivalurin er frá 2 til 7. juli, og túrurin verður frá 1. til 8. juli.

Um Festival del Sole:
• Fimleikafestivalurin er í Riccione í Norður Italia í døgunum 2. til og við 7. juli 2023
• Yvir 5.000 fimleikarar úr øllum heiminum luttaka
• Alt slag av fimleiki verður víst fram t.d. rútmiskt, amboð, estetiskt, aerobics, akrobatik o.a.
• Hvørt ferðalag framførir 3 ferðir á túrinum
• Framførslurnar eru á uppsettum økjum á strondini í Riccione
• Ymiskar workshops eru til luttakarar
• Innivist og matur skal bíleggjast gjøgnum festivalfyriskipararnar

Ferðalagið hjá Støkk:
• Allir limir, sum eru føddir í 2010 ella áðrenn, kunnu luttaka í framførslunum hjá Støkk (fimleikarar upp til 18 ár hoyra til ein ábyrgdara á túrinum)
• Onnur áhugað, í øllum aldri, kunnu verða við sum áskoðarar, tó mugu yngri enn 18 ár, hava ein ábyrgdara við
• Framførslurnar verða samansettar soleiðis, at allir fimleikarar, óansæð støði, kunnu luttaka og vera við í framførsluni hjá Støkk
• Venjing til fimleikafestivalin verður frá apríl til juni 2023
• Øll ferðast saman til Riccione, men veljast kann millum tveir pakkar við og uttan heimferð
• Allir íðkarar búgva saman á 3 stjørnaðum hotelli
• Onnur enn íðkarar eru sjálvandi vælkomin at hyggja eftir fimleikafestivalinum og kunnu bíleggja ferð við ferðalagnum hjá Støkk, og soleiðis ferðast og búgva saman við íðkarunum og eisini fáa atgongumerki til festivalin. Neyðugt er tá at skráseta seg sum hvílandi lim hjá Støkk áðrenn á www.stokk.klubmodul.fo og kostar tað 200 kr. um árið

Vegleiðandi prísur fyri íðkarar, áðrenn innsamlaður peningur er trektur av:
Vit hava tveir pakkar at velja millum:
- Fullur pakki
(Fullur pakki inniheldur ferð tur/retur úr Føroyum til Riccione, uppihald og 3 máltíðir um dagin).
Kostnaður er 9.500 kr. pr. persón. Umframt hetta kemur lummapeningur.
- Hálvur pakki
(Hálvur pakki inniheldur ferð úr Føroyum til Riccione (ikki heim aftur), uppihald og 3 máltíðir um dagin).
Kostnaður er 7.000 kr. pr. persón. Umframt hetta kemur lummapeningur.

Prísur fyri onnur enn íðkarar:
Enn fáa vit ikki ásett ein fastan prís, men hesin verður helst eitt sindur hægri enn hjá íðkarum, har felagið tryggjar ein mestaprís.

Skipað verður fyri innsamling við Skava og vinn. Íðkarar skulu luttaka í innsamlingini.

Freist:
Fimleikarar og onnur hjá Støkk, sum ætla sær til fimleikafestivalin, skulu melda til umvegis www.stokk.klubmodul.fo í seinasta lagi 5. nov. 2022. Við tilmelding skulu 1.000 kr. gjaldast. Restin verður goldin seinni. Tilmeldingin er bindandi.

Heilsan Fimleikafelagið Støkk

STØKK

BANKNORDIK XL BYG BORG SPORT 24